# Yvirum

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Eitt spæl, við minst 2-4 luttakarum.**

**Hav ein bólt og finn eitt minni hús, kanska ein lítlan hjall ella eina krógv, sum ikki eru ov stór ella ov høg.**

Býtið tykkum í tveir partar og stilli tykkum hvørjum megin húsið ella hjallin.

Nú ræður um at kasta bóltin upp um tekjuna, meðan rópt verður "yvirum" ella "henni over". Síðan skulu tey, sum standa hinumegin, royna at lofta bóltinum. Bólturin má ikki nerta jørðina.

**Síðan eru tveir mátar at spæla uppá:**

**1.** Tann sum loftar bóltinum, skundar sær yvirum húsið/hjallin og roynir at raka ein í hinum partinum, við at kasta bóltin eftir honum. Um hann rakar, so kemur tann rakti yvirum húsið/hjallin og í hansara part. Rakar hann ikki, fer hann yvirum aftur og hini eiga so at kasta bóltin yvirum. Um bólturin ikki verður loftaður, verður hann kastaður yvirum aftur, meðan rópt verður "yvirum" ella "henni over".

**2.** Verður bólturin loftaður, heldur spælið fram við, at kasta bóltin yvirum aftur, meðan rópt verður "yvirum" ella "henni over". Um bólturin ikki verður loftaður, fer tann, sum misti bóltin, burturúr spælinum. Tann bólkurin, sum klárar best at lofta og harvið missir minst av fólki, vinnur spælið.



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo